# StÍF køvdi Neistan

**MANSHONDBÓLTUR** Aðru ferð á rað fór Neistin tómhentur av vølli, tá StÍF í gjárkvøldið vann á Skála. Og H71 gjørdi einki býtt, tá Team Klaksvík vitjaði í Hoyvík




*StÍF gekk í gjárkvøldið í fótasporunum hjá H71 og vann á oddaliðnum, Neistanum, sum nú brádliga hevur tapt tveir dystir á rað*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

Hilmar Jan Hansen

Strandingar fara ikki av næstniðasta plássinum á stigatalvuni hetta kappingarárið, nú teir bara hava tveir dystir eftir. Men tað forðaði teimum ikki fyri í gjárkvøldið at spæla ein góðan dyst, tá Neistin var á Skála. So mikið góður var dysturin hjá StÍF, at tað rakk til ein sigur við tveimum málum á muni.

Oddaliðið, sum longu langt síðani hevur tryggjað sær pláss í FM-finaluni, mátti hinvegin fyri aðru ferð á rað staðfesta, at alt ikki koyrir heilt so væl, sum tað hevur gjørt tað fyrr hetta kappingarárið. Næstsíðsta sunnudag mátti Neistin eisini lúta við tveimum málum fyri H71, sum harvið rættiliga óvæntað kundi melda seg inn í finalukappingina – í øllum førum í eina løtu…

Í dystinum á Skála í gjárkvøldið menti Neistin sær ta vanligu leiðsluna í fyrra hálvleiki, sum eitt skifti var seks mál, men longu í steðginum var hon tódnað niður í tvey. Nakað inn í seinna hálvleik fór StÍF fyri fyrstu ferð framum, og hóast liðini togaðust eitt sindur, hildu strandingar fast síðstu tíggju minuttirnar, so Neistin ikki skuldi sleppa framum aftur – og tað helt til endans.

### Ivaleysur H71-sigur

Undan dystunum í gjárkvøldið átti H71 eitt serligt »met« í Atlantic Airways-kappingini, tí liðið var tað einasta, sum hevði vunnið á Neistanum og tapt fyri Team Klaksvík. Nú eru hoyvíkingar ikki longur teir einastu, ið hava bast oddaliðnum, men framvegis eiga teir hin partin av metinum.

Ikki tí, hesa ferð gjørdi H71 einki býtt, men spældi sannførandi og trygt ímóti klaksvíkingum, sum í veruleikanum ikki fingu eitt bein til jørðina. Hetta var næstan sum hjá manslandsliðnum á Dublinferðini um vikuskiftið, tí her sást beinanvegin munur á, og hann helt sær væl og virðiliga.

Mitt í fyrra hálvleiki skoraðu hoyvíkingar fimm ferðir á rað, uttan at Team Klaksvík fekk nakað mál, og tað sama var beinanvegin í seinna hálvleiki, tá H71 fekk seks mál í einum, og ímóti endanum. Saman við øllum hinum rakk hetta væl og virðiliga til sigurin, ið gav H71 tvær ferðir so nógv mál sum Team Klaksvík.

Sostatt livir FM-finaluvónin hjá hoyvíkingum enn, og um teir ikki seta stig til ímóti KÍF um vikuskiftið, verður tað heila bara uppaftur meira spennandi, hóast kollfirðingar bara skulu hava eitt stig aftrat fyri at fáa fulla vissu um pláss í finaluni.

# Stjørnan til Vestmanna

**KVINNUHONDBÓLTUR** Endaspurturin í Sunset-kappingini er í gongd, og í løtuni liggur Stjørnan best fyri av øllum, hóast Neistin enn er eitt stig frammanfyri

Hilmar Jan Hansen

Hetta kemst av, at Neistin bara hevur spælt 21 dystir, meðan Tjaldur hevur spælt 22 og Neistin 23.

Sostatt hevur Stjørnan fleiri skot eftir í byrsuni enn hini bæði, og eitt av teimum kunnu klaksvíkskvinnur loysa av í kvøld klokkan 19.45, tá tær spæla ímóti VÍF í Vestmanna.

Hetta er dysturin, sum bleiv útsettur mikukvøldið 16. mars, tí Stjørnan tá ikki hættaði sær úr Klaksvík, tí veðrið var so vánaligt.

Vinna klaksvíkskvinnur í kvøld á VÍF, yvirtaka tær aftur oddasessin og fara eitt stig fram um Neistan og fýra fram um Tjaldur. Neistin hevur bara ein dyst eftir, sum er á heimavølli ímóti júst Stjørnuni, sum hinvegin eisini skal spæla heima ímóti StÍF. Tjaldur hevur eftir at spæla úti ímóti VB og heima ímóti VÍF.



*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## H71-Team Klaksvík 42-21 (20-11)

Dómarar: Heri Petersen & Dánjal Samuelsen

**H71:** Sigmundur Dahl 6, Hans Kári Hansen 6, Bogi Krossteig 5, Rógvi Sørensen 5, Dánjal Tórgarð 5 (1), Rúni West Højgaard 4, Magnus á Rógvu 4, Esbern Patursson 3, Bogdan Florea 2, Ári J. Olsen 2
**Team Klaksvík:** Hanus Norðberg 6 (1), Dánjal Kjærbo 5, Andrias Ellingsgaard 3, Óli Jacobsen 3, Sámal T. Olsen 2, Jón Jacobsen 1, Vilhelm Vilhelmsen 1

## StÍF-Neistin 35-33 (17-19)

Dómarar: Tummas Juul Thomsen & Magnus í Króki

**StÍF:** Sveinur Justinussen 10, Leivur Justinussen 8, Jógvan Berg 5 (2), Jóannes Prestá 5, Marius Joensen 4, Jógvan G. Joensen 2, Jørmund Joensen 1
**Neistin:** David Edvardsen 9 (1), Heini Hanusarson 9, Jugoslav Djumic 5, Áki Mørk 3, Teitur Magnusson 2, Ingi Olsen 2, Sjúrður Thomassen 2, Guðfinnur Thorsteinsson 1

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 23 | 657 | 514 | 143 | 36 |
| 2 | Stjørnan | 21 | 592 | 493 | 99 | 35 |
| 3 | Tjaldur | 22 | 616 | 532 | 84 | 33 |
| 4 | VB | 22 | 568 | 550 | 18 | 24 |
| 5 | Kyndil | 23 | 530 | 586 | -56 | 14 |
| 6 | VÍF | 21 | 473 | 586 | -113 | 7 |
| 7 | StÍF | 22 | 438 | 613 | -175 | 5 |

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 23 | 801 | 643 | 158 | 41 |
| 2 | KÍF | 21 | 597 | 542 | 55 | 28 |
| 3 | H71 | 22 | 621 | 585 | 36 | 24 |
| 4 | VÍF | 22 | 626 | 577 | 49 | 23 |
| 5 | Kyndil | 22 | 569 | 583 | -14 | 21 |
| 6 | StÍF | 22 | 580 | 591 | -11 | 15 |
| 7 | Team Klaksvík | 22 | 521 | 794 | -273 | 2 |

# Ingi fegin um mótstøðu

**MANSHONDBÓLTUR** – Eg vildi sjálvandi helst vunnið á StÍF, men hinvegin kunnu vit fegnast um, at vit fáa mótstøðu frá øllum, nú FM-finalurnar nærkast, sigur spælandi venjarin hjá Neistanum, Ingi Olsen

Hilmar Jan Hansen

At Neistin í gjárkvøldið tapti fyri StÍF er nokk ikki tað, sum teir bláu høvdu ætlað sær, og tað er eisini ein mótsetningur til, hvussu suverent Neista-liðið hevur verið fyrr hetta kappingarárið. Men tað fær allíkavæl ikki venjaran at skelva:

– Vit eru ikki sovnaðir, men durva kanska eitt lítið sindur. Og við til søguna hoyrir eisini, at vit hava onkrar skaðar, so spælarar sum Jugoslavi Djumic og Áki Mørk ikki sleppa at spæla fullan dyst nú, sigur Ingi Olsen, ið hinvegin er fegin um ta mótstøðu, Neistin hevur fingið síðstu dystirnar.

– Tað vísir seg, at mótstøðuliðini geva okkum ein skarpan gang, tí nú tey ikki hava so nógv at spæla fyri, kunnu tey spæla frítt ímóti okkum. Til dømis vóru strandingar góðir í gjárkvøldið, meðan vit máttu staðfesta, at hjá okkum vóru nøkur ting, sum ikki riggaðu sum tey skuldu.

Neista-venjarin sigur, at hann heldur enn gjarna vildi vunnið dystin í gjárkvøldið, men at tað, at Neistin tapti, fortelur honum, at liðið nú noyðist at koma upp í hægri »gear«.

– Hetta snýr seg eisini um motivatión, og tí eri eg onkursvegna glaður fyri, at strandingar komu ímóti okkum við fullari ferð. Tað kann gera, at vit rakna við, so vit eru púra klárir, tá teir avgerandi finaludystirnir verða spældir, sigur Ingi Olsen.

*hilmarjan@sosialurin.fo*




*– Vit eru ikki sovnaðir, men durva kanska eitt lítið sindur, staðfestir venjarin hjá Neistanum, Ingi Olsen, eftir at oddaliðið í gjárkvøldið tapti annan dystin á rað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*